# rð



skiftir nógv við útisetunum á landsliðnum. Tað sæst tú eisini aðrastaðni, og bara í Danmark sært tú somu gongdina í løtuni, har fleiri av teirra profilum eru fluttir úr útlandinum og heim til Danmarkar. Føroyar eru einki eindømi í so máta, tí soleiðis er fótbóltsheimurin einaferð skrúvaður saman, sigur Jákup í Stórustovu.

Hetta er einki ónatúrligt í tí, metir Jákup í Stórustovu, tí, sum hann tekur til, so eru fótbóltsleikarar nomadir. Leikaraumboðsmaðurin minnir eisini á, at fótbóltsleikararnir bara eru menniskju, ið taka egnar avgerðir. Og tað eiga og skulu vit virða.

– Spælararnir eru næstan vorðnir fólkaogn, og fólk undrast og spyrja hví og hvat nú, tá ein leikari vendir heimaftur, eftir at hava roynt seg uttanfyri Føroyar. Tað kunnu vera ymiskar orsøkir til tess, skaðar og vantandi spælitíð til dømis. Og hevur hesin leikarin so eitt ynskja um at koma heim, og at koma fyri seg fáa spæligleðina aftur, so fari eg ikki at mótarbeiða tí, greiðir Jákup í Stórustovu frá. Hann fegnast eisini um, at leikararnir hava møguleikan at koma heimaftur, tí so væl stillaðir eru fótbóltsleikarar í øðrum londum ikki altíð.

– Vit mugu eisini minnast til, at fótbólturin er arbeiði hjá hesum monnum. Og tá vanligi føroyingurin kemur heim, eftir at hava arbeitt uttanlands í eina tíð, er tað eingin, ið setir spurnartekin við tað avgerðina, samanber Jákup í Stórustovu.

## Altíð føroyingar uttanlands

Hann skilir tó væl, at fólk harmast um, at profilarnir venda heim eftir.

– Eg skilji tað væl, og sjálvandi er tað harmiligt, at tað er so. Ikki minst fyri landsliðið. Men taka vit Súna Olsen og Rógva Jacobsen til dømis, so hava teir báðir verið uttanlands áður, komnir heim og farnir avstað aftur, vísir Jákup í Stórustovu á og sipar til nomadutilveruna, ið ger seg galdandi hjá fleiri av hesum monnum. Hann sær tað heldur ikki sum nakað krepputekin, at hesir menn venda heim aftur. Tvørturímóti er Jákup í Stórustovu bjartskygdur, tá tosið fellur inn á framtíðar útlitini hjá føroyskum fótbólti.

– Seinastu tíðina hava vit sæð, at fleiri royndir leikarar eru komnir aftur. Men hetta er ikki galdandi hjá teimum ungu. Føroyar fara altíð at hava eina ávísa nøgd av fótbóltsspælarum uttanfyri landoddarnar. Og um eini fýra ella fimm ár trúgvi eg, at meginparturin av landsliðsleikarunum spæla uttanfyri Føroyar, metir Jákup í Stórustovu.

## Ikki vantandi vilji

Ført hevur verið fram, at føroysku leikararnir ikki tykjast at vilja ofra tað, ið skal til fyri at fáa gjøgnumbroti í útlendskum felag. Hesum er leikaraumboðsmaðurin ikki samdur í.

– Eg haldi ikki, at vit kunnu seta spurnartekin við, um ein leikari ikki vil ofra seg nóg mikið, tí tað vilja teir. Hinvegin hevur onkur einstakur spælari ikki heilt verið innstillaður upp á, hvat lívið sum yrkisleikari uttanlands innibar. Og so eru tað eisini onkrir av eldru leikarunum, sum ikki tíma at royndarvenja, men fegnir taka av einum útlendskum sáttmála, fortelur Jákup í Stórustovu.

Hann er sum leikaraumboðsmaður bert vitandi um eittans dømi hjá honum, har ein leikari hevur takkað nei til tilboð frá útlendskum felag.

Sum Jákup í Stórustovu førir fram aðrastaðni á hesum síðum, er tað mennandi fyri einstaka leikaran, tá hann leitar sær eftir avbjóðingum uttanlands. Men Jákup í Stórustovu er sannførdur um, at vit í Føroyum eisini hava nógvar møguleikar fyri at menna egnar leikarar.

Hann nevnir eitt nú meiri skipað viðurskifti av fótbóltinum sum heild, skipaðar smákappingar vetrarhálvuna og innandurafótbóltshallir.

– Og hetta tak má takast í felag. Av Fótbóltssambandinum, feløgunum og annars teimum, sum varða av fótbóltinum, sigur Jákup í Stórustovu.




**Føroyar eru næst vánaligasta landslið í Evropa. Vit hava ikki fingið nakað stig í hvørki EM- ella HM undankapping síðan 2004. Seinastu árini hava vit raplað niður eftir styrkislistanum hjá FIFA. Í løtuni liggja vit nummar 195 – bara 12 lond eru aftan fyri okkum.**

**Sosialurin varpar komandi vikurnar ljós á keðiligu gongdina. Vit leita eftir orsøkunum til, hví tað gongur so illa í hond og spyrja hvat skal til fyri at venda óhepnu gongdini?**

**Lesið fimta part í røðini um kreppuna í føroyskum fótbólti.**



**6. partur**

**Í blaðnum næsta týsdag verður prátað við Alexander Djordjevic um sama evni**

